# Torkil Veyhe vann einkultstartin í Etika Cup

**SÚKKLING** Í sera góðum veðurlíkindum bleiv annar teiur av súkklukappingini Etika cup súkklaður í gjár

Heri Simonsen

Kappingin hesaferð var einkultstartur. Teinurin var 29,0 km langur. Úr Tórshavn til Kaldbaks og aftur til Tórshavnar. Tilsamans 8 luttakarar vóru við. Vinnandi súkklararnir høvdu rímuligar tíðir, men ikki eins góðar tíðir, sum fyrr eru settar á sama teini. Veðrið var gott, tí kundi roknast við at tíðirnar skuldu gerast heilt góðar. Men samanumtikið, lógu tíðirnar umleið einar tríggjar minuttir frá at verða heilt góðar. Ilt er at siga hví allir súkklararnir hava javnt verri tíðir, enn roknast kann við, ein grundgeving kann verða, at súkklararnir júst í løtuni eru í gongd við nógva og tunga venjing, og hetta ávirkar úrslitið tann skeiva vegin. Torkil Veyhe vann á Gunnari Dahl-Olsen, meðan Andrass Joensen og Morten Hansen gjørdust nummar 3 og 4. Hjá motiónistunum vóru tað veteranarnir Evald Rasmussen og Kári Simonsen sum blivu nummar 1. og 2. Teir báðir tilkomnu súkklarnir vísa ein ótrúligan vilja at verða við til kappingar. Í løtuni fyrireika teir seg eisini til eina »ironman« kapping, sum verður í summar. Hjá unglingunum var bert ein luttakari. Tað var Jóanis Albert Nielsen úr Sandavági. Tíðin hjá honum er, í mun til tíðir hjá unglingum annars, rættiliga góð.





## Úrslit 2. teinur Etika kup

| Nr. | Navn | Tíð | Munur | Bólkur |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Torkil Veyhe | 00.44.57 | 00.00.00 | Elita |
| 2 | Gunnar Dahl-Olsen | 00.46.13 | 00.01.16 | Elita |
| 3 | Andrass Joensen | 00.48.18 | 00.03.21 | Elita |
| 4 | Morten Hansen | 00.51.22 | 00.06.25 | Elita |
| 5 | Evald Rasmussen | 00.55.30 | 00.10.33 | Motión |
| 6 | Kári Simonsen | 00.59.10 | 00.14.13 | Mótión |
| 7 | Henry Berg | 01.03.14 | 00.18.17 | Elita |
| 8 | Jóanis Albert Nielsen | 01.04.14 | 00.19.17 | Unglingar |



*Hátíðarhaldið í Fimi endaði við, at fimleikarar frá Havnar Fimleikafelag og Ljósinum høvdu framsýning*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

# Fólkið frøddist um Fimi

**FIMLEIKUR** Seinnapartin í gjár vóru hundraðtals gestir komnir til hátíðarhald í nýggju og stásiligu fimleikahøllini í Havn, Fimi, sum nú er handað og klár at taka í brúk

Hilmar Jan Hansen

Havnar Hornorkestur spældi, røður vóru hildnar og fimleikarar frá bæði Havnar Fimleikafelag og Ljósinum høvdu framsýning.

Talan er um eina sera framkomna høll, sum fevnir um tvær rútmiskar hallir og eina amboðshøll. Á teimum tilsamans 3.900 fermetrunum eru allir hentleikar, ið krevjast í nútíðar fimleiki, og hóast ikki sær út til at vera spart upp á nakað, hevur prísurin upp á umleið 59 milliónir krónur hildið.

Høgt er til lofts og vítt til veggja í Fimi, sum harumframt eisini fer at geva umleið 500 áskoðarapláss til Tórsvøll. Enn er eftir at snøgga rundanum, men tá alt er liðugt, verður ítróttarøkið í Gundadali ein enn betri og samanhangandi eind.

Tað var heilt týðiligt undir hátíðarhaldinum í gjár, at fólkinum dámdi tað, tað sá, og ikki minst tey smærru frøddust um høllina og alt tað nógva, hon hevur at bjóða.

# 4 føroysk met og 9 juniormet ígjár



**SVIMJING** Svimjarnir løgdu hart út á Føroyameistarastevnuni ígjár

Heri Simonsen

3 føroysk met og 4 juniormet vórðu sett ígjár á Føroyameistarastevnuni í svimjing 2010, afturat tí eina føroyska metinum og 5 juniormetum frá Juniormeistarastevnuni og innleiðandi riðlunum í morgun. Hartil tangeraði Astrið Foldarskarð úr FLOT juniormetið í 50 metrar firvaldarsvimjing, við tíðini 30.05, har Helena Strøm Sævarsdóttir úr Suðuroyar Svimjifelag tíðliga í gjáramorgun setti juniormet við somu 30.05, soleiðis at ein av røttum átti, at talt skurðin ígjár at verða 4 føroysk met og 10 juniormet. Svimjarnir hava soleiðis lagt hart út, og munnu ikki mong fleiri føroysk met og juniormet fara at standa fyri falli í vikuskiftinum.

*heris@sosialurin.fo*